FISKIMÁLARÁÐIÐ

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postboks 45
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
3. mai 2019
Mál: 19/00015-30
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: TVR

Tygara skriv:

**Hoyringarskriv frá Fiskimálaráðnum til viðmerkingar frá Norðlýsinum**

Vísandi til kæru Fiskimálaráðsins til Fjølmiðlanevndina, dagfest 19. mars 2019, og hoyringarskriv Fiskimálaráðsins, dagfest 3. apríl 2019, og vísandi til bæði hoyringarskrivini frá Norðlýsinum, hevur Fiskimálaráðið hesar viðmerkingar:

Seinasta hoyringarskrivið frá Norðlýsinum er enn eitt dømi um, at Norðlýsið brúkar hetta kærumál til at koma fram við sínum politisku sjónarmiðum og uppáhaldum um menningarkvoturnar sum heild til tess at sáa iva í almenna rúminum um umsitingina hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum av menningarkvotunum, eins og hoyringarskrivini frá Norðlýsinum so hvørt verða løgd út á netið sum blaðgreinar - uttan at landsstýrismaðurin fær vart seg.

Í nýggjastu yvirskriftini, dagfest 24. apríl 2019, vil Norðlýsið enn einaferð vera við, at landsstýrismaðurin onga lógarheimild hevði at geva undantaksloyvi, sbr. bls. 1 og 36 í **skjali 1**. Tað var júst henda skuldseting, sum hetta mál byrjaði við, og nú verður skuldsetingin endurtikin, hóast Fiskimálaráðið í fleiri umførum hevur víst Norðlýsinum á sítt heimildargrundarlag at gera tillagingar og broytingar í tilsagnum um menningarkvotur. Viðmerkjast skal eisini, at spurningur um at flyta kvotur millum ár og at gera tillagingar í verkætlanini eru hvør síni mál, og tí skilir Fiskimálaráðið als ikki, hvønn relevans hesin upplýsingur hevur fyri málið, sbr. bls. 4 í seinasta hoyringarsvarinum frá Norðlýsinum.

**Heimildir og løgfrøði**

Tá ið tað kemur til heimildarspurningin skrivar Norðlýsið, sbr. bls. 8 í **skjali 1** og á bls. 3 í viðmerkingunum:

> “Lógarbókstavurin í nýggju lóggávuni, missur skjótt sín týdning um landstýrismaðurin ikki heldur seg til at hondhevja tær treytir, sum einstøku loyvini verða givin eftir.”

Og tað er júst her, at Norðlýsið misskilir munin millum greiðar lógarreglur og síðani avgerðir grundaðar á metingar (skønsmæssige afgørelser). Sum Fiskimálaráðið hevur víst á, er skipanin við menningarkvotum ein skipan grundað á metingar (skøn). Harafturat er vert at nevna, at landsstýrismaðurin sambært § 60, stk. 4 í sjófeingislógini kann áseta nærri reglur um mannagongdir og treytir, og tað hevur landsstýrismaðurin gjørt í kunngerð um menningarkvotur.

Landsstýrismaðurin kann somuleiðis víkja frá sínum egnu **administrativu** forskriftum (dispensation fra administrative forskrifter) og/ella gera tillagingar í egnum konkretum forvaltningsaktum, eins og hann kann taka egnar fyrisitingarligar avgerðir aftur – alt á óskrivaðum

fyrisitingarættarligum grundarlagi, sum er eitt viðurkent heimildargrundarlag (tilbagekaldelse og ændring af forvaltningsakter).[1]

Tað tykist sum um, at Norðlýsið vil hava Fjølmiðlanevndina at eftirmeta materiella heimildargrundarlagið hjá Fiskimálaráðnum at gera tillagingar í tilsagnum viðvíkjandi menningarkvotum – sum enntá eru til fyrimunar fyri borgaran, har atgongdin til at gera tillagingar vanliga er munandi víðari, enn tá talan er um byrðandi broytingar og/ella afturtøkur.

Fjølmiðlanevndin kann sjálvsagt ikki fara inn og viðgera sjófeingislógina og ítøkiligar avgerðir sambært henni, men Fjølmiðlanevndin kann kanna, hvørt miðilin hevur yvirhildið fjølmiðlaábyrgdarlóggávuna, herímillum leiðreglur um góðan fjølmiðlasið, tá ið Norðlýsið móti betri vitandi hevur lagt landsstýrismannin undir at hava disponerað í heimildarloysi, og lagt umsitingina undir at hava váttað fyri hesum.

**Norðlýsið og evropeiski mannarættindasáttmálin ("EMRS")**
Í seinasta hoyringarsvarinum frá Norðlýsinum verður gjørt eitt sindur burturúr skrivi-, talu- og framsøgufrælsinum hjá fjølmiðlum. Í hesum føri er tað serliga parturin um EMRS, art. 10 (1), ið er áhugaverdur. Norðlýsið endurgevur, Jón Fríðrik Kjølbro, dómara í evropeiska mannarættindadómstólinum í Strassbourg. Norðlýsið skrivar á bls. 24 og 25 í **skjali 1** og á bls. 8 í viðmerkingunum:

> "Rættarpraksis eftir EMRK vísur eisini, at fjølmiðilin ikki eingang hevur fulla próvbyrðu, men at tað er nóg mikið um tað fyriliggur **"faktisk grundarlag" ("value judgments")** fyri slíkari umrøðu. Sum dømi nevnir Norðlýsið, at Kringvarpið bleiv frídømt í sakini hjá Jørgen Niclasen, hóast Kringvarpið í sama dómi av landsrættinum varð dømt til at mortificera høvðusyvirskriftina "*Snýtti landskassan fyri 600.000 kr*"."

Norðlýsið tykist her blanda hugtakið "value judgements" við hugtakið "statement of facts", tá ið tað kemur til próvbyrðuna. Um Norðlýsið hevði lisið eitt sindur víðari í bókini hjá Jón Fríðrik Kjølbro, so stendur (**áherðsla** Fiskimálaráðsins):[2]

> "I sager om ærekrænkende udtalelser, skal der sondres *mellem ytringer om faktiske forhold ("facts") og værdidomme ("value judgements")*. **Først nævnte er kendetegnet ved, at udtalelsernes rigtighed lader sig påvise**. Sidstnævnte er kendetegnet ved, at der er tale om subjektive vurderinger, hvis rigtighed ikke lader sig påvise."

At leggja ein landsstýrismann undir at hava disponerað í heimildarloysi, er samstundis at leggja landsstýrismannin undir at hava skúgvað til viks tær skyldur, sum landsstýrismaðurin hevur sambært lóggávuni. Tað er tí talan um eina skuldseting fyri viðurskifti, ið revsast kann fyri, sbr. § 5, stk. 1 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins. Og tað blívur ikki penari av, at Norðlýsið leggur umsitingina í Fiskimálaráðnum undir at hava váttað fyri hesum. Av tí sama er ikki talan um subjektivar metingar, "value judgements", hvørs rættleiki illa ber til at prógva, men "statement of facts", sum ber til at prógva, um skuldsetingin hevði verið sonn.

Jón Fríðrik Kjølbro skrivar víðari (**áherðsla** Fiskimálaráðsins):[3]

[1] Sbr. m.a. U.2008.1686H undir notu 3 í fyrra hoyringarskrivi frá Fiskimálaráðnum.
[2] Sbr. Jón Fridrik Kjølbro: Den Europæiske Menneskerettighedskonvention – for praktikere, 4. udgave, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (2017), bls. 992.
[3] Sbr. Jón Fridrik Kjølbro: Den Europæiske Menneskerettighedskonvention – for praktikere, 4. udgave, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (2017), bls. 992.

> "Hvis der er tale om ærekrænkende udtalelser om *faktiske forhold*, skal journalisten være i stand til at føre *sandhedsbevis* for udtalelsens rigtighed. *Kravet om sandhedsbevis kan fraviges*, hvis der foreligger særlige omstændigheder. Ved vurderingen heraf lægges bl.a. vægt på karakteren og grovheden af injurierne og i hvilket omfang journalisten med rimelighed kunne anse en kilde som pålidelig med hensyn til de pågældende beskyldninger. Hvis journalister **fremkommer med med faktuelle beskydninger, skal de handle i god tro** og overholde det journalistiske krav om pligt til at kontrollere rigtigheden af faktuelle beskyldninger. **Hvis en journalist handler i god tro og på et tilstrækkeligt faktuelt grundlag, kan det være i strid med konventionen at dømme journalisten, selv om det viser sig, at de faktuelle beskydninger er usande**."

Sum dømi um góða trúgv orsakað av nøktandi faktuellum grundarlagi kann nevnast dómurin, *Aquilina v.fl. móti Malta*, har ein journalistur varð dømdur fyri at hava skrivað, at ein advokatur á einum rættarfundi varð funnin sekur í vanvirðing fyri rættinum (foragt for retten).

Journalisturin hevði bert skrivað tað, sum hann hevði sæð og hoyrt undir rættarfundinum, og sum seinni varð váttað av tveimum persónum, sum høvdu verið til staðar í rættarsalinum.

Nevnast kann eisini dómurin, *Bladet Tromsø og Stensaas móti Noregi*, har ein tíðindamaður og ein redaktørur blivu dømdir fyri ærumeiðing fyri at hava skrivað, at nakrir persónar umborð á einum skipi høvdu flett kópar livandi uttan at hava ført sannleikaprógv fyri skuldsetingunum um djórapínslu.

Mannarættindadómstólurin í Strassbourg kom til ta niðurstøðu, at málið hevði stóran samfelagsligan áhuga, og at journalistarnir høvdu havt orsøk til at trúgva upp á rættleikan í skuldsetingunum. Greinin var grundað á eina frágreiðing frá einum inspektøri á einum almennum stovni í Noregi. Persónarnir vórðu tí mettir at vera í góðari trúgv orsakað av faktuella grundarlagnum í málinum. Av tí sama bleiv Noreg dømt fyri brot á EMRS, art. 10 (1) fyri at hava revsað journalistarnar.

**Norðlýsið skuldsetur uttan nakað faktuelt grundarlag**
Tað er eingin ivi um, at alt viðvíkjandi menningarkvotunum hevur stóran samfelagsligan áhuga. Tað er heldur einki at ivast í, at fjølmiðlar hava eitt víðkað skrivi- talu og framsøgufrælsi, tá ið teir viðgera mál av samfelagsligum áhuga. Hetta til tess at hava fólksligt eftirlit við valdsharrunum og at skapa kjak í einum demokratiskum samfelagi. Serliga tá ið talan er um kritikk av politikarum og – *ikki minst* sitandi stjórn. Men hetta merkir tó ikki, at fjølmiðlafrælsið er heilt uttan avmarkingar. Heldur ikki, hóast talan er um atfinningar móti sitandi stjórn.[4]

Norðlýsið hevur lagt landsstýrismannin í fiskivinnumálum undir at hava disponerað í heimildarloysi, tvs. framt lógarbrot, og fyri at styrkja um hesa ógrundaðu skuldseting, hevur Norðlýsið móti betri vitandi lagt umsitingina í Fiskimálaráðnum undir at hava váttað fyri hesum.

Talan er sostatt um eina ógrundaða skuldseting fyri nakað, har tað er heimild fyri at revsa. Sambært leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið er eingin sekur, fyrr enn hann er dømdur, sbr. pkt. 4.5, sbr.

---

[4] Sbr. Jón Fridrik Kjølbro: Den Europæiske Menneskerettighedskonvention – for praktikere, 4. udgave, Jurist- og Økonomforbundets Forlag (2017), bls. 996: *"Grænserne for ytringsfrihed synes at gå ved alvorlige faktuelle beskyldninger, herunder om strafbare forhold, uden tilstrækkeligt faktuelt grundlag... Der kan være tale om beskyldninger om, at en politiker bevidst har vildledt regeringen og handlet i strid med gældende regler ved udpegning at lederen af en institution, sbr. t.d. Standard Verlagsgesellshchaft Mbh móti Eysturríki, dómsgrundir 39-44."*

Umsitingin í Fiskimálaráðnum hevur í fleiri umførum víst Norðlýsinum á sítt heimildargrundarlag, og Fiskimálaráðið hevur eisini í fleiri umførum gjørt Norðlýsið varugt við hetta, men Norðlýsið hevur ikki rættað inn. Heldur valdi Norðlýsið at leggja okkurt afturat greinini, hóast yvirskriftin var tann sama, og parturin viðvíkjandi váttanini frá umsitingini varð somuleiðis standandi óbroyttur. Hetta verður als ikki mett at vera ein nøktandi rættleiðing.

Fiskimálaráðið greiddi enntá Norðlýsinum frá muninum millum at hava onga lógarheimild og so at hava heimild á óskrivaðum grundarlagi, men hetta fekk heldur ikki Norðlýsið til at rætta inn. Sostatt ber ikki til at vísa til møguliga "begrebsforvirring" sum orsøk fyri skuldsetingina og als ikki, nú Norðlýsið so seint sum tann 24. apríl 2019 havur valt at endurtaka skuldsetingina, sbr. bls. 1 og 36 í **skjali 1**.

Mett verður tí, at talan er skuldseting ("statements of facts") og ikki "value jugdements". Norðlýsið hevur als onki prógv lyft fyri hesum skuldsetingum, men roynir heldur at verja seg við sínum egnu misskiljingum av sjófeingislógini. Dømi um hetta er bls. 13 í svarskrivinum frá Norðlýsinum, dagfest 29. mars 2019.

Fiskimálaráðið hevur í teimum teldupostum, ið Fiskimálaráðið legði við kæruni til Fjølmiðlanevndina, givið Norðlýsinum høvi at rætta inn, hóast tað ikki bleiv gjørt. Fiskimálaráðið hevur eisini greitt Norðlýsinum frá umrødda heimildargrundarlagnum – eisini tá ið Norðlýsið av fyrstan tíð spurdi inn til hetta - og sostatt kann Norðlýsið langt frá sigast at hava verið í góðari trúgv, og har eru ongar faktuellar umstøður í málinum, sum stuðla hesum. Sostatt eru vit langt frá teimum umstøðum, sum Jón Fríðrik Kjølbro og dómsvenja annars hava víst á viðvíkjandi góðari trúgv hjá fjølmiðlum orsakað av nøktandi faktuellum grundarlagi.

Sjónarmið um víðkað skrivi-, talu- og framsøgufrælsið hjá fjølmiðlum mótvegis sitandi stjórn kunnu heldur ikki rættvísgera eina tílíka skuldseting - uttan at nakað sum helst faktuelt grundarlag er at stuðla seg til, og - fyri at styrkja um ógrundaðu skuldsetingina - at leggja umsitingina hjá landsstýrismanninum undir at hava váttað fyri hesum. Tvørturímóti hevur umsitingin í Fiskimálaráðnum gjølla greitt Norðlýsinum frá heimildargrundarlagnum, men Norðlýsið tvíheldur kortini upp á skuldsetingina mótvegis landsstýrismanninum.

Fiskimálaráðið hevur fyribils ikki fleiri viðmerkingar til málið.

Blíðar heilsur

Torkil V. Rasmussen